Mobil Oil stóran áhuga fyri Føroyum:

Sínámillum álit er altavgerandi

–Tað eru føroyingar, sum eiga oljuna, um hon finst. Vit bjóða okkum fram at finna hana. Til tess krevjast stórar íløgur og hesar vilja vit vága. Men tað er eisini sera avgerandi, at treytirnar, sum settar verða okkum, eru rímuligar, og at tær ikki verða broyttar í tíð og ótíð. Hetta vóru nakrar av niðurstøðunum, sum Sosialurin gjørdi sær á vitjan á høvuðsstøðini hjá Mobil Oil í Aberdeen herfyri.

Tony Qayyum, stjóri fyri nýggjum verkætlanum hjá Mobil Oil heldur skúlingina av fólki verða eina av teimum størstu avbjóðingunum í eini komandi føroyskari oljuvinnu. Mynd jan

Mobil Oil er eitt av feløgunum í "føroyska" oljusamtakinum "Atlantic Margin Group".

Og Mobil er ikki hvør sum helst. Talan er um triðstørsta oljufelagið í heiminum. Bert Exxon og Shell eru størri.

Mobil Oil arbeiðir kring allan heim og tekst við nærum alt innan olju – frá leiting til framleiðslu og sølu.

Fyritøkan, sum hevur høvuðssæti í USA, hevur gjørt sera stórar íløgur í Norðsjónum og rekur eitt av teimum størstu oljufeltunum har, nevniliga Beryl.

Herfyri fór fyritøkan í samstarv við Statoil og Enterprise Oil við tí fyri eygað at leita eftir olju á føroyska landgrunninum.

Fyri at kunna føroyskar journalistar og almenningin í Føroyum um oljufeløgini í samtakinum og hvat hesi standa fyri vitjaðu føroyskir fjølmiðlar í Stavanger, Aberdeen og London fyri kortum og harímillum høvuðsstøðina hjá Mobil í bretska oljuhøvuðsstaðnum Aberdeen.

Fylgja sera væl við

Hóast føroyska økið enn er lítið kannað og tað tí bert finnast fáar upplýsingar um møguleikan at finna olju í undirgrundini, og hóast Mobil hevur nøgv jørn í eldinum kring allan knøttin, so fylgir fyritøkan sera væl við í øllum tí, sum hendir á Føroyaleiðini.

Vit vita ikki, hvat finst í undirgrundini, um olja í heila tikið finst har, men nú vit hava keypt seismisku upptøkurnar frá Western arbeiða vit við at tulka tilfarið og kanna, hvat er undir basaltinum. Hetta er fyrstu ferð, at tað hevur eydnast at síggja, hvat er undir basaltinum, og í løtuni leita vit eftir onkrum "leads" tvs. onkrum ávísum í undirgrundini, sum kann leiða okkum víðari til lummar, fellur o.l. sum kunnu goyma olju sigur Phil Sands frá Mobil Oil við Tíðindablaðið Sosialin.

Vísa hesar fyrstu seismisku upptøkurnar, at har er "okkurt" at ganga víðari eftir, so fara teir at gera enn meira burtur úr seismikkinum. Eitt nú at gera meira framkomna 3D seismikk.

Very early days

"But it is very early days" tað er sera stutt frálíðið - sigur Phil Sands, tá vit spyrja hann, nær væntast kann, at ein møgulig oljuvinna er í gongd á føroyska økinum. Tað ræður um at halda høvdið kalt og hava bæði bein á jørðini. Tað hevði t.d. verið alt ov tíðliga nú av føroyingum at farið undir at gera íløgur við tí í huga, at ein oljuídnaður fer at koma.

-Líta vit eftir royndunum aðrastaðni, so ganga vanliga upp í 10 ár frá byrjan til framleiðslu. Í dag gongur hetta nakað skjótari. Hetta sigi eg ikki fyri at taka nakra vón frá tykkum. Høvdu vit ikki vónir um at finna olju, so høvdu vit neyvan heldur keypt seismikk frá økinum.

Latið okkum saman fáa gjørt tað tekniska arbeiðið og latið okkum so krossa fingrar og vóna, at ein oljuvinna verður veruleiki, sum bæði føroyska fólkið og oljufeløgini kunnu fáa gagn av.

Vilja vága nakað

Men hví vilja tit vága so nógvar pengar í einum øki, sum er so ókent og har alt er so óvíst?

–Tað er partur av okkara fyritakssemi at vága nakað. Og hetta gera vit, tí vit rokna við at fáa okkurt burtur úr. Vit halda so eisini, at Atlantic Margin Group hevur nakað av bjóða føroyingum.

Phil Sands heldur annars, at samansetingin av hesum oljusamtakinum er góð.

Mobil er tann fíggjarliga sterka fyritøkan. Hon er heimsins triðstørsta oljufelag og er við í stórum verkætlanum sum Beryl, Statfjord og Hibernia við New Foundland, sum skjótt fer í gongd.

Enterprise er tann nýggja entreprenørfyritøkan, har ung og skúlað oljufólk eru ein stór avbjóðing til nýggj øki.

Statoil er so tann norðurlendski parturin, sum hevur tilknýti til mentanina og umhvørvið í eitt nú føroyskum øki.

Hetta skuldi verið ein góð blanding. Afturat hesum kemur, at øll feløgini arbeiða í útjaðarøkinum The Western Slope, sum Føroyar eru partur av. Jarðfrøðiliga vitanin hjá feløgunum frá økinum vestan fyri Írland og norður til Miðnoregs kemur sera væl við í kanningunum við Føroyar.

Tit verða ikki snýttir

Phil Sands frá Mobil Oil heldur ikki, at føroyingar eiga at bera ótta fyri at verða snýttir av oljufeløgunum, nú hesi heita á føroyskar myndugleikar um ikki at seta órímuligar treytir, tá farið verður undir at bora eftir olju.

Tað ringasta, sum kann henda og sum vit avgjørt ikki ynskja, er at lógarkarmurin verður soleiðis hátt áður, at oljufeløgini sleppa undan at gjalda nakað sum helst.

-Talan má vera um at finna eina javnvág, har oljufeløgini taka hædd fyri føroyskum ynskjum og øvugt. Vit vilja vera ærligir. Sjálvandi hoyrir tað til okkara bransju at verið við til at vága nakað, men oljuídnaðurin verður noyddur til at gera so stórar íløgur í føroyska økinum, at hann má eisini tryggja sær, at partaeigararnir fáa nakað aftur. Tí má skattingin vera rímulig.

Men lat meg gera tað fullkomiliga greitt, soleiðis at eingin misskiljing verður: tað er Føroya fólk, sum eigur oljuna, um hon finst, og ikki oljufeløgini. Tit eiga oljuna, vit bjóða okkum fram finna hana fyri tykkum. Sum land mugu tit tryggja tykkum, at tit fáa tykkara rímuliga part av inntøkunum. Men tað er greitt, at tað her snýr seg um at finna eina javnvág.

Phil Sands heldur spurningin um inntøkur frá eini komandi oljuvinnu vera ómetaliga týdandi at viðgera longu nú, soleiðis at fólkið, sum eigur oljuna, ikki kennir seg snýtt.

150 mill.kr. fyri eitt hol

-Vit mugu sum oljufeløg spæla við opnum kortum, ja leggja kortini á borðið. Og tað er m.a. at greiða frá, hvussu stórar íløgur talan er um, tá farast skal undir at bora. Bara at bora eitt hol á føroyska landsgrunninum fer at kosta einar 150 mill. kr. Tað er munandi meira enn um talan var um boring í Norðsjónum. Royndirnar eru tær, at tað í miðal skulu borast 10 hol, áðrenn tú finnur nakað, so tá tosa vit

Framhald á síðu 23

Sjónvarpsmaðurin og útvarpsmaðurin lýða á, hvat ein av ovastu stjórunum í Enterprise Oil hevur at siga. Mynd jan

Phil Sands frá Mobil Oil, uttast til høgru greiðir frá komandi verkætlanunum hjá Atlantic Margin Groupe. Her er hann saman við umboðum fyri Enterprise, Statoil og føroyskum journalistum. Mynd jan

nøvn nú

Hey, Henning, Sólrun og Brynleif
Tillukku við degunum 19. og 20. mai [illegible]
øll á Suðurlaks

Góða Hanna
Hjartaliga tillukku við 2 ára føðingardegnum 16. mai

Góði abbi
Mangan hevur tú drigið hesa slangu! Hjartaliga tillukku á 75 ára degnum. Takk fyri alt, tú ert fyri okkum
Vit á Lýðarsvegi 11

Óli fær eisini eina heilsan
Mamma og babba

Góði Runi
Hjartaliga tillukku á 24 ára degnum 23. mai. Eisini ein heilsan til Kata og Eyðvør
Bestu heilsanir frá Rakul

Góða Dania
Hjartaliga tillukku við 20 ára degnum 19. mai. Hetta er akkurát tú
Bestu heilsanir
lítli beiggi

Framhald av síðu 16

longu um upphæddir oman fyri milliardina, áðrenn vit raka við olju, um vit í heila tikið gera tað.

Áðrenn oljufeløg fara undir so stórar íløgur vilja tey sjálvandi tryggja sær, um tey finna tey olju, at tey eisini nakað burtur úr. Men yvirskotið til oljufeløgini skal heldur ikki vera so stórt, at føroyska samfelagið verður við svikusøð. Tann dag vit vita, hvussu løgarkarmurin fer at sigga út, tá kunnu oljufeløgini betri gera upp, hvat tey skulu gera og hvussu nógvar pengar tey vilja brúka. So alt hetta byggir á, hvat føroysgeikar fara at spæla út við í sambandi við lisenstreytirnar.

Krøvini aðrastaðni!

-Finna vit út av, at krøvini í løgarkarminum verða munandi harðari enn tey eru í t.d. Bretlandi, Írlandi og aðrastaðni, har myndugleikarnir eisini fegnir vilja hava oljufeløgini at leita og gera íløgur, so fara oljufeløgini kanska at siga før oyingum, at tey heldur vilja bíða her og ístaðin gera íløgur, har lisens- og skattatreytirnar eru meira lagaligar og rímuligar.

Men hetta er sjálvandi nakað, sum oljufeløgini vilja sleppa at tosa við oljuráðleggingarnevnd og myndugleikarnar um.

Sostalurin skilur annars á teimum fólkum blaðið hevur hitt undir vitjanini í bæði Aberdeen, London og Stavanger, at oljufeløgini vóna, at tað ikki fer at ganga ov drúgv tíð, til tey verða kunnað um komandi treytirnar fyri at bora eftir olju við Føroyar. Tey skulu nevniliga gera alt rættiliga stórt fyrireikingararbeiðir og metingar, áðrenn tey endaliga gera av at fara undir víðari kanningar og at bora.

Vit vilja fegnir vera opnir

Vit spurdu Phil Sands frá Mobil, hví teir hava valt at vera so opnir fyri føroyska almenninginum, nú ein oftani hevur varhugin av, at avís oljufelag siga alsenki.

Síðani vit skipaðu Atlantic Margin Group hava vit valt at vera opnir og ærligir. Okkum dámar ikki at krógva nakað og vit vilja hava eitt opið og gott samstarv við bæði oljufyrisiting og ráðgevingarnevnd.

Við at vera opnir og siga tingini sum tey eru vóna vit at kunna tæna føroyskum áhugamálum mest møguligt.

Mobil Oil hevur annars í hyggju at fara undir at bora í teimum økjum tað hevur fingið tillutað beint eystan fyri føroyska markið.

Talan er um blokkarnar har norðuri og heilt úti á 1500 metra dýpi.

Tørvur á boripallum

Men her er trupulleikin í dag at finna hóskandi boripallar. Tað er nevniliga so, at bert fáir boripallar kunnu brúkast úti á so stórum dýpum, og hesir pallar eru nógv umbiðnir í løtuni.

-Tá vit hava ein slíkan boripall, vónandi í 1996 ella í 1997 fara vit at bora fyrsta holið vestan fyri Hetland. Vit vildu fegin gjørt tað nú, men eingin boripallur er tøkur. Neyðugt verður helst eisini at umbyggja boripall til endamálið.

Mobil hevur vónir um at finna stórar strukturar í økinum, sum verður kallað "Føroyska bassengið". Hetta er stóra økið heilt vestur móti Hetlandsrennuni.

Norðsjógvurin er nærum líðugt kannaður. Vit vita, hvat kann finnast har og roknað verður ikki við at finna tær heilt stóru oljukeldurnar. Men millum Føroyar og Hetland er talan um eitt so stórt ókannað øki, at tað kann vera, at her finnast heilt stórar oljukeldur. Tað eru tær vit leita eftir sigur Phil Sands.

Men samanumtikið kann sigast, at talan er um at vága sera stórar upphæddir, tí økið er so ókent og umstøðurnar eru so nógv torførari at arbeiða í enn aðrastaðni.

Nettup av hesi sannroynd vóna oljufeløgini, at treytirnar settar verða teimum av føroysku myndugleikunum vera rímuligar.

Attraktivt

-Tað ræður um hjá føroyingum at gera tað so attraktivt sum gjørligt fyri oljufeløgini sigur ein av kanningarstjórunum hjá Mobil í Aberdeen, pakistanføddi Tony Qayyum.

Umstøðurnar við Føroyar eru so nógv øðrvísi enn aðrastaðni, og hetta krevur nógv av oljufeløgunum, og nettup tí ræður um hjá føroyingum at gera arbeiðsumstøður o.l. innbjóðandi fyri feløgini.

Nógv arbeiði skal gerast áðrenn vit finna olju. Men tá hon er funnin, so kovrir tøkið. Fer at ganga skjótt so verður kanska borað í 1997 ella í 98.

Hann sigur, at sjálvur løgarkarmurin er tað týdningarmesta fyri oljufeløgini, so tey vit, hvar tey standa og hvussu tey skulu arbeiða.

Tony Qayyum heldur tað er umtaðandi ikki at seta ait ov høgar vónir til inntøkurnar frá eini komandi oljuvinnu í nýggju útjaðaraøkjunum, og tað er av týdningi, at politikararnir gera sær hesa støðu púra greiða. Ein kann ikki gera sær vónir um somu inntøkur frá oljuvinnuni í nýggjum økjum við stórum íløgum sum eitt nú oljuævintýrið í Norðsjónum hevur verið tað, í hvussu er ikki í byrjanini.

Mobil-stjórin heldur annars, at føroyingar eiga at leggja stóran dent á alt, sum hevur við útbúgving at gera, nú tað stundar móti eini oljuvinnu.

Alt tað tú fyritekur tær í hesi vinnu má vera rætt og trygt. Tað er alt ov kostnaðarmikið at fara aftur um aftur. Tí er tað so umráðandi við væl skúlaðum fólkum á øllum økjum.

Hóast umstøðurnar vestan fyri Hetland eru truplari enn í Norðsjónum so heldur Mobil-stjórin, at hetta økið liggur sera væl fyri, tí tað liggur beint uttan fyri dyrnar. Allar tænastur kunnu veitast í grannalagnum og at talan er um eitt politiskt stabilt øki hevur sera stóran týdning.

Men hann leggur stóra áherðslu á, hvussu týdningarmikið tað er, at tað er sinamillum álit millum oljufeløg og eigaralandið.

-Vit mugu kunna líta hvør á annan, og so er tað eisini ógvuliga avgerandi, at gjørdar lógir og treytir ikki verða broyttar í tíð og ótíð.

-Annars haldi eg, at The Atlantic Margin Group er eitt sera sterkt og gott samtak. Orsøkin til at vit hava tikið stig til henda bólkin er sjálvandi fyrst og fremst at býta risikoina millum fleiri feløg, nú tað skulu so stórar íløgur til.

jan

Hvat er tín meining um Rúsdrekka

Fundur á Fjallsgarði
Leygardagin 20 mai kl. 16.00
Rúsdrekka ávirkan og avleiðingar ?

- ERU PRÍSIRNIR OV HØGIR ?
- VERÐUR MEIRA DRUKKIÐ NÚ ?
- DREKKUR UNGDÓMURIN MEIRA NÚ ?
- VERÐUR MEIRA BRENT OG BRYGGJAÐ NÚ ?
- KANN RÚSDREKKANÝTSLAN MINKAST ?

LUTTAKARAR :

August Gabriel Wang *Rúsdrekka- og Narkotikaráðið*
Sólborg Dulavík *[illegible]*
Niels O. Joensen *[illegible]*
Andrias Petersen *[illegible]*
Kari Thorsteinsson *[illegible]*
Peddy Højgaard *[illegible]*
Helgi Jacobsen *[illegible]*

Felagsnevndin hjá Fráhaldsfeløgunum

ROKKJALLARIN

Vit ataka okkum at selja fyri fólk
Eisini keypa vit deyðsbúgv

ROKKJALLARIN - Tlf. 11990
Tinghúsvegur 42 - 100 Tórshavn

Ruba reinsað – væl reinsað

Opið er:
Mánad.–fríggjad.
kl. 10–12 & 13.30–17

REINSAR ALT!
Klæði, gardinur, teppi, ruskinn o.a.

Magnus Heinasonarg. 15 - Havn - Box 1267 - **Tlf. 16301**